# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Opin heimsins vindum

Í hugvekjandi tíðargrein finst Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður at kringvarpspolitikkinum. Men greinin er eisini ein atfinning til føroyskan mentanarpolitikk. Tað argar tingmannin, at tað tykist, sum donsk lættisoppamentan fær alt meira rúm í føroyskum fjølmiðlum. Almenni public service stovnurin røkir ikki sína uppgávu sum tjóðarbyggjari. At mentan sum heild og serstakliga móðurmálið eru hornasteinar í allari tjóðarbygging og hesum munnu øll vera samd í.

Hvat merkja so hesar sera hvøssu atfinningar? Hvørji eru ørindi tingmansins? Er hetta gamaldags mentanarkonservatisma og gamal føroyskur ótti fyri, at útlendsk mentan útruddar okkara mál og mentan? Er hetta ein roynd at halda øllum útlendskum burtur frá føroyskum durum eins og valdshararnir í Kina og á Cuba á sinni royndu at forða fólkinum atgongd til alnótina? Ella er hetta eitt neyðarróp frá einum alt meira frustreraðum politikkara, sum ásannar, at almenni public service stovnurin, sum við lóg sleppur at krevja yvir fýrati milliónir frá brúkarunum samt fær íløgur úr landskassanum og hartil rekur kommersielt virksemi í eirindaleysari kapping við privatar miðlar, als ikki megnar at lúka tey public service krøvini at fjálga um móðurmál og mentan – at menna bókmentir og list, at geva uppvaksandi ættarliðinum eitt minstamát av mentanarligari kálvføðing?

Tórbjørn Jacobsen hevur grein í sínum máli, men fer hann ikki skeivur, tá hann gevur samanleggingini av ÚF og SvF skyldina fyri vánaliga standin? Er veruliga orsøkin til mentanarligu neyðina ikki júst hetta, at nýskipaði almenni public service stovnurin ikki fær ta fíggjarligu orku, sum honum tørvar? Stovnurin verður jú av politisku myndugleikunum tvungin at útvega sær part av fíggjarliga tilfeinginum við kommersiellum virksemi – at nýta førleikar og orku til annað enn public service. Eftir okkara áskoðan er tað her, ið vit skulu leita eftir meginorsøkini til misnøgd tingmansins. Tað ræður tí um at fáa til vega eina politiska semju um at tryggja kringvarpinum ta fíggjarliga støði, sum krevst fyri at framleiða gott public service og samstundis lata privatu miðlarnar hava lýsingamarknaðin í friði. Bert á henda hátt kunnu túsund blómur blóma og túsund meiningar brótast, sum Mao, sáli tók til.

Vit duga annars ikki at síggja, at føroyingar fara mentanarliga um koll, bert tí teir hava høvi at síggja danskt ella annaðt útlendskt sjónvarp, ella av at føroyingar taka lut í donskum undirhaldssendingum, spæla tónleik á donskum festivalum, spæla á donskum leikpallum ella spæla danskan fótbólt. Hetta kann bert vera gott. Føroysk mentan er fjølbroytt og sterk. Føroyskt mál stendur sterkt, men kundi verið betur røkt av okkum fjølmiðlum. Einhvør mentan stendur seg best við at verða vard, men og samstundis at vera opin heimsins vindum, sum Piet Hein sigur. Tórbjørn endurgevur Heðin Brú, jú, men júst hann mælti eisini staðiliga føroyingum til at lata gluggarnar upp og at draga tjøldini frá, tí mentan byggir brýr millum tjóðir.

**Sosialurin**

## Totalt langt úti

**JÓGVAN Á HØVDANUM (YNGRI)**

Blaðstjóri á Ð blaðinum

Haldi tað vera totalt langt úti av Marjun Niclasen at taka M! blaðið og Tidens Kvinde av hyllunum og koma við einari skralltómari frágreiðing, at tað er heilsuskaðiligt hjá børnunum, at síggja eitt hálvnakið konufólk á einari forsíðu. Kundar hava sjálvandi altíð rætt, men fyri tað, um ein ella tvier kundar ikki dáma at síggja eitt slíkt blað í tykkara handli, so er ongin grund fyri, at taka bløð av hyllum, sum hóast alt selja væl. Tað at blaðið verður selt aftan fyri diskin ger tað, at fólk ikki fara at tora at keypa hatta vælsignaði blaðið, sum tit hava skírt at vera meiri ella minni eitt pornoblað. Keypi sjálvur altíð M! blaðið (og FHM fyri tann saks skuld) og haldi, at hetta regluøsa tvæltið má og skal fáa ein enda í Føroyum. Tað líkist svartasta ongum, at tit lata tey fáu, fáa sín vilja ímóti meirilutanum.

Ger tær sjálvum eina tænastu, Marjun og bið "teir góðu" kundarnir halda munn næstu ferð teir siga, at hetta ella hatta blaðið ikki skal standa frammi. Vóni ikki, at komandi Ð blað, sum kemur út í summar, fær somu viðferð, sum tit hava givið M! blaðinum. Annars so kunna tit eisini taka bommini av hyllunum, sum eru á "barnahædd", tí tað síggja og keypa børn, og tað er sku' meiri skaðiligt enn nakað annað blað. Og ímeðan tit eru í gongd, so avskaffa Se & Hør, tí har eru kvinnurnar spillnaknar ... uha!

Skemt til síðis. Tak bløðini fram aftur ella stong handilin, eru míni boð.

## Kunnu vit fáa eina frágreiðing?

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Vit hava nú hoyrt so nógv ymiskt um framtíðina hjá Familjudeildini – úr nógvum sjónarhornum. Hvat sigur landsstýriskvinnan og samgongan?

Vit hava hoyrt fleiri ymiskar ætlanir um, hvør framtíðin hjá Familjudeildini er. Tí hesar spurningar til landsstýriskvinnuna í Almannamálum.

- Hvørvur samdøgurstilboðið?
- Hevur landsstýriskvinnan umhugsað uppskotið hjá verandi starvsfólkum á Familjudeildini, um at víðka verandi tilboð til eisini at verða dagtilboð?
- Hvussu ætlar landsstýriskvinnan at fyribyrgja, at serkunnleikin sum starvsfólkini á Familjudeildini á Barnaheiminum hava bygt upp síðani 2002 hvørvur?
- Sambært sáttmálunum hjá øllum feløgunum sum vara av starvsfólkunum skilst, at starvsfólkini og yrkisfeløgini skulu verða hoyrd í slíkum málum. Á hvønn hátt eru starvsfólk og yrkisfeløg hoyrd í hesum máli?
- Heldur landsstýriskvinnan at framferðarhátturin hevur verið í lagi í mun til starvsfólk, brúkarar og viðskiftafólk?

Endamálið við Familjudeildini er at kanna foreldraførleikan hjá smábarnafamiljum.

Familjudeildin lat upp í 2002, tí tørvur var á samdøgurstilboði heldur enn dagtilboði, vit hava enn ikki hoyrt grundgevingarnar fyri, hví samdøgurstilboðið nú brádliga ikki er eitt gott hugskot.

Mín fatan er, at hetta er eitt av fáu tilboðunum vit hava í Føroyum har talan er um fyribyrgjandi arbeiði. Tað er ikki at skilja, hví taðer fyribyrgjandi arbeiðið sum verður burturspart. Vit vita øll, at tað kann gerast dýrt at spara á fyribyrgingarpartinum. Um rætt ikki verið borið at, meðan tíð er, kunnu familjurnar – fyri ikki at siga børnini - fáa enn størri trupulleikar og hava tørv á nógv meiri hjálp seinni. Tørv sum er væl dyrari enn familjudeildin.

Fyrst fingu vit boð um at Familjudeildin skuldi niðurleggjast, síðani segði landsstýriskvinnan í almannamálum at soleiðis var ikki.

Sum skilst hava mannagongdirnar í samband við at sleppa inn á Familjudeildina verið ov stirvnar viðhvørt og Familjudeildin hevur staðið tóm av og á. Starvsfólkini hava fyri fleiri mánaðum síðani gjørt uppskot um, hvussu virksemið kann gerast meiri víttfevnandi.

Vit hava í miðlunum hoyrt landsstýriskvinnuna og stjóran á almannastovuni siga hvør sítt um framtíðina hjá familjudeildini. So vit sóknast nú eftir einum svari um, hvør ætlanin veruliga er.

**Hvat sigur samgongan?**
Fólk verða uppsøgd, serkunnleikin – sum vit í so mongum førum sakna í Føroyum – hvørvur. Yrkisfeløgini siga at revolvarapolitikkur verður nýttur. Ikki eitt kis hoyrist frá samgonguni? Samtykkja tit? Taka tit undir við framferðarháttinum? Ella skammast tit?

Stjórin á almannastovuni metir ikki, at tørvur er á einum samdøgurtilboði, men fakfólk sum vísa familjum til Familjudeildina eru ósamd.

**Framferðarhátturin**
Ætli ikki at látast, sum eg eri serføðingur í hesum máli ella sum heild í familjuøkinum– tí tað eri eg so langt ífrá! Men, sum málið er lýst júst nú, er fatan mín, at her er ikki borið serliga væl at: Nøkur starvsfólk eru uppsøgd, hini kenna ikki setanartreytir ella starvsinnihald sítt framyvir, yrkisfeløgini kenna seg hildin fyri spott og siga seg ikki vera hoyrd í málinum, viðskiftafólk eru kanska noydd at senda familjur av landinum – og serkunnleikin fer fyri skeyti. Her ruggar ikki rætt!

Í mun til starvsfólkini er ikki trupult at hugsa sær alla ta vitan tey hava ognað sær hesi árini. Ímyndið tykkum, royndirnar tey hava fingið, sparringina tey hava havt, bøkurnar tey hava lisið, skeið og útbúgvingar tey hava fingið til júst hetta økið. Sólarklárt er, at vit hava tørv á hesi vitan og at hon skal virðast! Hon fer nú í allar ættir!

Tí spyrji eg: Kunnu vit fáa eina frágreiðing?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.